# Kekkia - eitt lítið brúkt ferðamál hjá føroyingum



*Vaclav-plássið (eisini kallað Wencelaus-torgið) er tað størsta av fleiri torgum í Prag. Við ovara enda á hesi boulevardini liggur Tjóðminnissavnið*

**Eins og aðrir norðbúgvar funnu føroyingar í sínari tíð útav, at tað loysti seg at fara at ferðast suðuri við Miðalhavið, tí har var alt nógv bíligari enn her norðuri á okkara leiðum. Nú eru prísirnir har líka høgir sum í hinum ES-londunum. Danir hava tí funnið sær onnur mál: tey gomlu kommunistalondini eystanfyri, har alt er bíligt. Men føroyingar hava gjørt lítiðav at ferðast har**

FERÐAFRÁSØGN

*Finnbogi Ísakson*

Tað kemur tó fyri, at føroyingar fara eysturum, og eisini her er tað fótbólturin, sum ger sína ávirkan galdandi. Nakað av fólki hevur altíð verið við landsliðnum, tá tað er farið av landinum, og hesi fólkini hava upplivað eitt nú Prag í Kekkia. Heimafturkomin hava tey ovfarin reypað av hesum vakra býi.

Kommunistaræðslan hevur helst havt betri fastatøkur á føroyingum enn á øðrum tjóðum. Tað tekur sína tíð at venja seg við, at londini hava ikki eina kommunistiska samfelagsskipan longur. Tað merkir tó ikki, at ongin kommunistur er eftir. Í teimum fyrrverandi kommunistalondunum hava hesir flokkar shinað seg upp og kalla seg nú sosialistar. Í Kekkia eru teir ikki so heilt fáir. Á valinum í vár fekk sosialistaflokkurin 41 sessir í Tjóðartinginum, sum hevur 200 sessir tilsamans.

### Heldur øðrvísi at vitja

Lat meg siga, at tað er ikki akkurát tað sama at vitja í Kekkia sum td í Spania, Italia ella Grikkalandi. Í hesum londum - í hvussu so et á teimum støðum, har mong vitjandi koma ár eftir ár - er ongin trupulleiki at samskifta við fólk. Tey duga altíð nakað av enskum, og á teimum plássum, sum næstan bara hava turismu, duga tey ofta eitt sindur av onkrum skandinaviskum máli.

Her er ein munur. Tað er ikki so lætt at samskifta við fólk í Kekkia. Høvuðsorsøkin er, at tey 41 árini - frá 1948 til 1989 - tá Kekkoslovakia var kommunistiskt, var russiskt teirra fyrsta fremmandamál. Síðani komu ungarskt, týskt, enskt og franskt. Tey mongu duga einki uttan kekkiskt og kanska eitt sindur av russiskum, líka veit eg. Tað týska var sum Harragud veit og tað enska lítið mætari.

Tó skal sigast, at á matstovum og fyri ein part í handlum inni í miðbýnum í Prag skiltu tey so nøkurlunda enskt. Onkur var uppímillum, sum tað bar til at hava eitt rættiligt prát við.

Síðani kommunisman fall í 1989, er skúlaskapurin umskipaður - sum alt annað. Nú eru antin enskt ella franskt tað fyrsta fremmandamálið, og eg hugsi, at russiskt er bara ein vallærugrein.

### Óblíðskapur

Tað er eisini øðrvísi við tænastuveitingini. Á teimum støðum, har ferðandi vanliga koma, er tænastan sum heild góð. Eitt nú á Vaclav-Plássinum og í Gamla Býnum. Men ikki allastaðni. Onkustaðni eru tey beinleiðis óblíð. Hví tað er, veit eg ikki. Onkur sigur, tað er tí, at kekkarar eru svinnir av lyndi. Men eitt er at vera svinnur, annað at vera óblíður. Onkur annar sigur, at hetta er arvur frá kommunistatíðini. Tá var ikki neyðugt at tæna kundunum, tí tey, sum arbeiddu í handlum og á matstovum, høvdu ongan áhuga í, um tað gekk væl ella illa.. Tað ráddi bara um at vera á arbeiðsplássinum í 8 tímar fyri at fáa løn.

Okkurt kundi bent á, at ein partur av forkláringini liggur her. Tað løgna er bara, at tey óblíðu vóru mangan tey heilt ungu, sum nóg illa, kanska als ikki, minnast kommunistatíðina.

Tað ringasta dømi, vit bæði Ása upplivdu, var á høvuðsjarnbreytini, har vit vildu hava broytt ferðaseðilin heim. “Daman” innanfyri var treisk sum eitt brótaraross, og tað leið væl, at hon gálvaði eftir okkum.

Onkur føroyingur, sum hevur verið í Ungarn í summar, sigur, at har er sama skilið. Eg trúgvi einki, at slavarar ella ungararar sum fólk eru óblíðari enn onnur fólkasløg, og tí er væl hugsandi, at tað er ein gomul samfelagsskipan, sum er grundin til støðuna.

Og løgreglan? Jú, eg prátaði eitt sindur við onkran politist, tá vatnflóð herjaði, og teir vóru fyrikomandi. Verri var, tá vit bæði Ása fóru á politistøðina at melda ein stuldur. Vit sótu í einari lítlari gong og bíðaðu. Ein kvinnuligur politistur kom og spurdi, hvat vit vildu. Jú, melda ein stuldur. Hon bað okkum bíða og fór innaftur.

Á hurðini stóð, at vit skuldu ikki banka uppá, bara bíða. Og vit bíðaðu, eitt langt og sjey breitt. At enda kom hon við einum skjali, sum vit skuldu fylla út. Hon fekk tað aftur, og vit bíðaðu. Loksins kom hon so við hesum skjalinum, umsettum til kekkiskt, við fínum stemplum og undirskriftum. So var málið avgreitt hjá politinum.

Tá høvdu vit sitið har í minst tríggjar tímar. Seinnaparturin var fokin.

Kortini mentu vit okkum upp at fara aftur á eina politistøð, tá tjóvsvættini aftur høvdu verið í holt við okkum. Ein mannligur politistur lovaði okkum inn í gongina og fór so sjálvur longur inn.

Tá vit høvdu bíðað í ein tíma, bankaði eg uppá og gloppaði hurðina. Har sat hann við beinunum uppi á borðunum og las eitt blað. Eg spurdi, nær hann fór at avgreiða okkum.

- Drei stunden!

Neitakk, tríggjar tímar aftrat tímdu vit ikki at bíða. Eftir einum kekkiskum skjali. So - vit fóru.

Gud viti, hvaðani tann arvurin mundi koma.

### Og so til tað góða

Hetta frammanfyri havi eg skrivað sum vegleiðing til teirra, ið kanska kundu hugsað sær at farið til Kekkia ella eitthvørt annað fyrrverandi kommunistaland eystanfyri at ferðast. Tey eiga bara at vita, at tað er ikki akkurát tað sama sum at ferðast í Norðurlondum ella Suðurlondum.

Tá tað er sagt, so er eftir at gera vart við alt tað góða. Og har eigi eg fyrst at siga, at eitt er at vitja Prag, annað er at vera úti á bygd. Helst er munur allastaðni í verðini millum høvuðsstaðir ella stórbýir og so smærri býir og bygdir.

Vit vóru í Prag í 6 vikur og í einum summarhúsum sunnan fyri Prag í 14 dagar. Og har var stórur munur á. Í bygdini, sum lá tætt við og kallaðist Cisovice, búðu eini 400 fólk. Stutt haðani, vit búðu, var ein lítil handil, har allar vanligar húsarhaldsvørur fingust. Og uttanfyri bar til at seta seg niður við einum drekkamunni ella einari sodavatn. Ella øl. Ella onkrum øðrum.

Var veðrið ikki til vildar, bar eisini til at standa inni í handlinum og njóta eitthvørt. Júst sum eg minnast fyrr í tíðini, tá skotskir og enskir trolaramenn stóðu við diskin hjá Kemma ella Jens Klæminti í Klaksvík og drukku øl.

Tað var ein kona miðskeiðis í fjørutiárunum, sum átti handilin, sum hon hevði keypt fyri nøkrum árum síðani. Hon dugdi eitt lítið sindur av týskum. Tann eina dagin stóð mamma hennara í handlinum, sum hevði opið frá kl. 8 til 18. Hon dugdi bara kekkiskt og ungarskt. Í nakrar dagar var tað dóttirin, fyrst í tjúgunum, sum var krambagenta. Hon dugdi rættiliga fitt av enskum. Hon var jú útbúgvin í teirri nýggju skipanini, har enskt kann vera fyrsta fremmandamálið.

Um allar tríggjar er at siga, at tær vóru stak blíðar.

Í Cisovice var ein minni handil í hinum endanum á bygdini. Men annars var einki, hvørki matstova ella nakað annað at fara til.

Harafturímóti var ein góð matstova í einari aðrari lítlari bygd stutt haðani, 7 minuttir við tokinum. Og har bar eisini til at bowla. Verturin var av blíðastu monnum, maturin var góður, og tað eina kvøldið bar hann okkum ókeypis ein eyka góðan bita, meðan vit bowlaðu.

### Einki Internet

Ein av plágunum í Prag vóru tjóvsvættini. Teir vóru allastaðni, tjóvarnir, men ringastir vóru teir í sporvogninum á einum stuttum strekki inni í miðbýnum. Eg ivist ikki í, at tað hevði verið lagamanni hjá politinum at fanga teir, legði tað í.

Men í Cisovice vóru vist eingir tjóvar. Ein dagin fóru vit til Dobris, ein hálvan tíma at koyra við tokinum. Eg hevði ligið á einum bonki í bíðirúminum og slangað mær, meðan vit bíðaðu eftir tokinum. So gáloysin hevði eg verið, at eg hevði mist fartelefonina. Men tá vit nakrar tímar seinni komu aftur til Cisovice, lá telefonin á bonkinum, har eg hevði mist hana.

Ikki var infrastrukturin so væl útbygdur allastaðni. Í miðbýnum í Prag vóru nógvar Internet-kaféir, og tað kom væl við hjá okkum, sum so at siga bara høvdu hvørtannað at práta við í fleiri mánaðir. Á kaféunum kundu vit so hava samband heim og eisini lesa bløðini og Útvarpið.

Men í Cisovice var einki Internet. Í grannabýnum Mnísek, 4000 fólk, heldur ikki. So hildu vit, at tað mundi fara at ganga í Dobris við 8000 íbúgvum. Men gakk. Allastaðni fingu vit sama svar:

- Internet? Nei, so muga tit fara til Prag!

Og so koyrdu vit til Prag at hyggja í Internetið. Ein tíma við tokinum. Á hesi lítlu tokstøðini í Cisovice skilja tey hvørki enskt ella týskt, so vit spyrja við heimagjørdum fingramáli og orðabók, um tað er beint, at seinasta tokið úr Prag til Cisovice fer kl. 23.15. Jú, tað er rætt.

Men tað var ikki rætt, tí hesa klokkutíðina koyrdi tokið bara sunnudag. So út at leita eftir onkrum staði at gista fyri ein rímiligan prís. Vit endaðu á einum vallaraheimi mitt í býnum. Vit bæði Ása og 100 hálvvaksin.

### Gott og bíligt

Kekkia er, hóast nevndu trupulleikar, eitt gott land at ferðast í. Og Prag er ein av heimsins fagrastu høvuðsstaðnum. Mong torg, vakrir og gamlir bygningar, tann aldargamla snotuliga borgin, har forsetin Vaclav Havel heldur til, áin sum rennur gjøgnum býin, parkirnar og mangt, mangt annað.

Og bíligt er tað eisini. Tað er tí, so nógvir danir vitja her. Tað ber eisini til at búgva bíligt. Gera tit sum vit og finna onkra brúkiliga íbúð í Prag á Internetinum og kanska eitt smmarhús uttanfyri Prag í nakrar dagar, so ber til at leiga frá privatum í 8 vikur fyri 9000 kr.

Maturin í handlunum er bíligur, drykkjuvørur íroknaðar, og tað er eisini bíligt at eta úti. Okkurt gott niðurundir, ein góðan høvuðsrætt, eina fløsku av reyðvíni afturvið, alt fyri 125 kr.

Men minst til: tú skalt halda teg til tað kekkiska. Bæði støð og mat og drekka.

Alt tað útlendska hevur ES-prísir.



*Ein harra Novotny átti íbúðina í Prag og summarhúsið sunnan fyri Prag. Hann sæst her saman við Ásu*